LM-022/2025

FYLGISKJAL 2

Sólgerð Hjørleifsdóttir

Fra:	Janus Hentze í Stórustovu
Sendt:	9. september 2025 14:58
Til:	Almanna- og mentamálaráðið
Emne:	Almannaverkið - Hoyringsskriv - Viðv. uppskoti til broyting í almannapensjónslógini
Vedhæftede filer:	~ 610.K04-0053_25-4 Hoyringssvar 605019_4_0.DOCX

Til Almanna- og mentamálaráðið,

Viðheft er hoyringssvar frá Almannaverkinum viðvíkjandi uppskoti til broyting í almannapensjónslógini.

Vinaliga

Janus H. í Stórustovu
Fulltrúi

Stjórnarskrivstovan, Fyrisitingin
Beinl. tel. 347002

almannaverkið

Staravegur 18 | Postrúm 3096 | FO-110 Tórshavn | Tel. 360000 | av@av.fo | www.av.fo

LM-022/2025

almannaverkið

Almanna- og mentamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 9. september 2025
J.nr.: 610.K04-0053/25-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv.: 23/11839

Viðgjørt: Janus Hentze í Stórustovu

Viðv. uppskoti til broyting í almannapensjónslógini

Almannaverkið hevur móttikið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., og hevur hesar viðmerkingar:

Ein av broytingunum inniber, at persónar við b-inntøku kunnu enda við at hava fulla pensjón eitt árið, og síðan missa pensjónina heilt árið eftir. Hetta setir krøv til neyva og góða ráðgeving og vegleiðing frá Almannaverkinum, tá pensjónistar hava b-inntøku.

§ 22, stk. 2 ásetir, at persónar við b-inntøku hava skyldu at veita Almannaverkinum neyðugar upplýsingar um inntøku, so Almannaverkið kann áseta pensjónina samsvarandi inntøkuni. Almannaverkið metir, at viðmerkingarnar eiga at nevna, at talan kann verða um mál, har pensjónistur við b-inntøku kann fáa fulla pensjón í longri tíð, t.d. 18-20 mánaðir, fyri síðan at fáa eina stóra rokning, tá inntøkuupplýsingar endiliga fyriliggja. Talan kann verða um viðurskifti, ið pensjónisturin ikki hevur ávirkan á. Um hetta er eitt ov drúgt tíðarskeið uttan, at Almannaverkið hevur eitt inntøkugrundarlag at rokna pensjónina eftir, kann heimild møguliga setast í ásetingina, ið loyvir Almannaverkinum at forhondsroknað inntøkuna hjá viðkomandi pensjónisti.

Viðvíkjandi nýtsluni av orðinum 'mótrokning' í uppskotinum til komandi § 23, stk. 2, kundi møguliga annað hóskandi orð verið brúkt, orsakað av, at 'mótrokning' innan løgfrøðina inniheldur heilt onnur krøv enn ta mótrokning, ið almannapensjónslógin leggur upp til. Í undirheitinum til lógaruppskotið stendur 'ásetan av pensjón eftir forvunnari inntøku undanfarnar mánaðir, ið fevnir um sama hugtak sum mótrokning sambært uppskotinum. Ásetingin kundi heldur verið, at 'afturgjaldingin kann fremjast við, at ein upphædd verður drigin frá í komandi pensjónsútgjøldum til pensjónistin.' Sambært uppskotinum verður einans víst til 'fólkapensjónistin'. Eigur hetta ikki at verða galdandi fyri allar pensjónistar?

Sambært uppskotinum verður § 18, stk. 2, nr. 3 orðað soleiðis, at viðbøtur verða útgoldnar uttan mun til inntøkugrundarlagið hjá pensjónistinum. Almannaverkið mælir til, at tað einans stendur 'viðbót' í eintali, av tí at ein pensjónistur einans fær eina av nevndu viðbótunum útgoldna.

Av § 22, stk. 1 framgongur, at pensjónistur skal boða frá broytingum í viðurskiftum sum t.d. andlát. Verður her hugsað um andlát hjá møguligum hjúnafelaga? Orðingin kann næstan lesast soleiðis, at pensjónistur skal boða frá egnum andláti.

Í § 28, stk. 1 manglar helst røtt tilvísing til ásetingina til síðst.

Í § 34 um nær pensjónin verður útgoldin mælir Almannaverkið til at broyta orðingina, soleiðis at alt stendur í stk. 1, soleiðis at tað í sama stk framgongur, at pensjónin verður

útgoldin frammanundan fyri verandi pensjónistar, og at hon verður útgoldin afturúr fyri pensjónistar, ið fáa pensjón tillutaða eftir 31. des 2025.

Í serligu viðmerkingunum á síðu 24 framgongur til nr. 2 (§ 17, stk. 2), at galdani § 8 ásetir treytir fyri innvinnan av pensjón. Hetta skal helst verða § 3. Í sama teigi verður mett, at eitt 'ikki' vantar í setninginum um, at tað ikki skal bera til at innvinna dupultan rætt til almannapensjónir. Haraftrat verður mælt til, at tað verður nágreinað, at tað ikki fer at bera til at innvinna meira enn 40/40 *í Føroyum*, tí talan kann verða um persónar, ið hava fulla føroyska pensjón og nakrar brotpartar aftrat úr øðrum landi, ið er innvunnið annað tíðarskeið.

Viðvíkjandi gildiskomuni framgongur, at § 1, nr. 5-11 kemur í gildi 1. januar 2027. Í serligu viðmerkingunum stendur § 1, nr. 6-12, so her er ikki samsvar. Almannaverkið metir, at hetta eigur at verða § 1, nr. 7-12.

Vegna Almannaverkið

Janus H. í Stórustovu
fulltrúi

Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn • Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo